Dagf. 8. mai 2024
HMR j. nr. 24/10787-4

Margit Stóra
landsstýriskvinna

Svar

upp á

Fyrispurning nr. 52-118/2023 eftir § 52 a í tingskipanini viðvíkjandi enda á fosturtøku, frá Jenisi av Rana, løgtingsmanni

Spurningurin var soljóðandi:

1. Hvørjar mannagongdir eru á føroysku sjúkrahúsunum fyri fostrinum, frá tí løtu, lívstráðurin er kvettur, og til aktuella fosturtøkan er endað?

Svar:

Til spurning 1

Sambært Sjúkrahúsverkinum er mannagongdin soleiðis, at tá ið talan er um fosturtøkur áðrenn viku 12 í viðgongutíðini, verða tær vanliga framdar sum medisinskar fosturtøkur. Verður fosturtøkan framd kirurgiskt, verður vevnaðurin burturbeindur sum ein lívfrøðilig burturbeining.

Vanliga verða fosturtøkur ikki framdar eftir 12. viku í Føroyum, men í teimum førum, har talan er um seinar fosturtøkur (eftir viku 12 og áðrenn viku 22) hevur kvinnan/parið møguleika sjálvi at avgera, hvat skal gerast við fostrið. Í tílíkum førum verður vegleiðing givin um hvørjir møguleikar eru. Sambært Sjúkrahúsverkinum ynskja tey flestu at jarða fostrið í eini grøv hjá einum avvarðandi. Ynskja tey ikki at hava fostrið við heim, verður fostrið burturbeint sum ein lívfrøðilig burturbeining.

Heilsumálaráðið, 8. mai 2024

Margit Stóra
landsstýriskvinna